# Lítið ungmannafelag við stórum ætlanum

**Ungmannafelagið Súlan í Mykinesi hevur bert 43 limir. Men hetta forðar teimum ikki í at leggja ætlanir fyri framtíðina. Felagið ætlar nevniliga at seta gomlu dansistovuna í bygdini í upprunaligan stand. – Vit ynskja at virka fyri samanhaldi í bygdini, sigur formaðurin, Katrina Johannesen.**

FELAGSARBEIÐI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Mykines:** Hesar ætlanir vórðu lagdar fram fyri aðalfundin í felagnum týsdagin í hesi vikuni.

Umfram val av nevnd, so varð eisini tosað um ta gomlu dansistovuna í bygdini, sum man treingja til eina kæra hond.

Aðalfundurin samtykti tí eisini, at henda dansistovan, sum felagið eigur, skal setast í upprunaligan stand.

– Vit fara nú at endurreisa hana, soleiðis at hon aftur kann gerast eitt aktiv í bygdini.

– Harvið kann hon eisini gerast ein partur av mentanarlívinum í Mykinesi, sigur forkvinnan í Súluni, Katrina Johannesen.

Í felagnum eru 43 limir. Felagið hevur ikki verið so virkið í longri tíð, men nú er kortini nógv sum bendir á, at okkurt fer at henda í felagnum í framtíðini.

Felagið hevur søkt Sørvágs kommunu um stuðul til hetta. Málið var fyri á seinasta fundi, men eingin støða varð tikin til hesa umsóknina, tí fíggjarnevndin hjá Sørvágs kommunu mælti til at beina málið aftur í trivnaðarnevndina.


*Mykinesfólk hava ikki mist vónina um framtíðina hjá bygdini. Ætlanin er nú at savna fólkið til mentanarligt arbeiði og at endurreisa dansistovuna*

### Byrja á einum staði

At felagið ikki hevur verið so virkið tey seinnu árini er ikki uttan orsøk: Fólkatalið í bygdini er minkað nógv og tí eru fá fólk eftir í oynni.

Á útoyggjum er virksemið ofta sera lítið, og smittar hetta so aftur av uppá felagsvirksemið á staðnum.

– Við at seta dansistovuna í stand kann felag okkara hava eitt høvi at gerast virkið aftur.

– Og nú er so ætlanin at vit byrja við dansistovuni, sigur Katrina Johannesen.

Hon vissar tó um, at felagið hevur aðrar ætlanir enn bert hetta. Umhugsað verður at skipa fyri ymiskum tiltøkum og at luttaka í virksemi saman við hinum útoyggjunum.

### Styrkja samanhaldið

Ungmannafelagið Súlan varð stovnað í 1945, og er endamálið at varðveita og lívga um føroyskar siðir og minni.

Endamálið er eisini at arbeiða fyri upplýsing og framburði, at skapa meiri samanhald og samvirkan millum ungdómin í bygdini.

Hinvegin so miðar arbeiðið somuleiðis ímóti at geva limunum høvið at seta fram hugsan sína í talu og skriving, so teir mentanarliga gerast meiri búnir.

Ein slík orðing er ikki øðrvísi enn hjá øðrum slíkum ungmannafeløgum, sum vórðu stovnað í 1890-árunum. Men í Mykinesi gekst ikki eftir ætlan.

Sum fráleið sovnaði felagið, men ikki heilt: Í 1990 tóku ungfólk í bygdini stig til at fáa felagið virkið aftur.

Endamálið var at fáa lív aftur í frítíðarvirksemið í bygdini og at savna pening at endurreisa dansistovuna. Í dag eigur felagið 30.000 kr. á bók.

– Vit vóna, at felagið kann virka fyri at samanhaldið millum bygdarfólkið og tey sum vitja í bygdini verður styrkt.

– Okkara ynski er eisini at samstarva við onnur ungmannafeløg - og sjálvandi at vit fáa fíggjarliga undirtøku til ætlanina við dansistovuni, sigur Katrina Johannesen.

# Siglandi festivalur

**Í døgunum 26-28. juni verður ein spennandi ungdómstúrur umborð á Norrønu. Í hesum døgum leggur Elin Hentze í Stórustovu, samskipari, saman við Smyril Line seinastu hond á alskyns tiltøk, ið verða á skránni á ungdómstúrinum.**

UNGDÓMSTÚRUR
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Hetta er triðju ferð Smyril Line skipar fyri slíkum ungdómstúri. Í fjør var túrurin í skúlatíð, men í ár er hann á skránni júst tá skúlin er liðugur:

– Á henda hátt kunnu øll fara róliga avstað, tí tá eru próvtøkurnar lidnar, skúlin liðugur og summarfrítíðin byrjað. Tað er vert at hátíðarhalda, sigur Elin Hentze í Stórustovu.

Elin váttar somuleiðis, at fyrireikingarnar ganga sera væl, men at enn eru øll tiltøkini ikki kunngjørd:

– Vit hava longu avdúkað nøkur tiltøk, men í næstum fara vit at avdúka enn fleiri spennandi tiltøk, sigur Elin og leggur afturat, at umborð á hesum ungdómstúrinum nýtist ongum at keða seg:

– Tað verða tiltøk á skránni allan túrin. Um dagin fara eitt nú bólkar og einstaklingar at spæla í uttandurabarrini – Skybarrini, Saranja Hammer fer at undirvísa í 'kickboksing' og aerobic á dekkinum, og í Skybarrini fer hon at undirvísa í salsa. Eisini verða tvær hárfríðkanarkvinnur við umborð, ið eitt nú fara at sveisa hár í alskyns litum uppí. Og til teirra, ið ynskja at taka sær av løttum um dagin, verður ein vakurleikafrøðingur, sum fer at gera andlitsviðgerðir og at leggja make-up. Um kvøldið frá klokkan 21 og út á morgunin verður eitt rimmar gildi við eitt nú Showmonnum, DJ Tummix, Skunk og øðrum.

### 16 ára aldursmark

Á ungdómstúrinum er 16 ára aldursmark, og øll ung undir 18 ár skulu hava váttan frá foreldrum/verja fyri at kunnu luttaka á túrinum:

– Vit leggja stóran dent á at skipa túrin 100% áðrenn vit fara avstað - eitt nú koma nóg mikið av vaktum og starvsfólkum við, leggur Elin at enda afturat.

Í løtuni ber til at bíleggja sær ein ferðaseðil til ungdómstúrin fyri bert 370 krónur. Prísurin er galdandi fyri eitt ferðafólk í couchettu, men eftir 15. mai kostar ferðaseðilin meira.


*Elin Hentze í Stórustovu*

# 1000 næmingar sýna list fram

**Hetta vikuskiftið verður eins og undanfarin ár árliga framsýningin hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla í Eysturskúlanum í Havn.**

LIST
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Allan vetur hava 3000 næmingar arbeitt dúgliga á ymisku verksmiðjunum, sum Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli hevur boðið fram í ár. Hetta vikuskiftið verður endabresturin við eini fjølbroyttari framsýning í Eysturskúlanum, har um 1000 næmingar frá kvøld- og ungdómsskúlanum luttaka. Jóhannes Eli Iversen, stjóri, sigur, at vónirnar til framsýningina eru góðar:

– Vit fara at seta framsýningina upp seinnapartin og í kvøld. Vit hava lagt alt væl til rættis, og eg vænti, úrslitið verður framúr.

Á framsýningini í ár verða, umframt alskyns tekningar, handverk, fotomyndir o.a., somuleiðis fjølbroyttar tónleikaframførslur. Eitt nú spælir Havnar Hornorkestur, barnakóri Dropar við Sigrið Sivertsen og bólkurin Bendarspónir við Karl A. Klein á odda:

– Vit ætlaðu at hava fleiri konsertir á skránni, men nógv eru longu farin í páskafrítíð, so tað bar ikki til. Men sum nakað serligt, hava vit í ár tekningar og málningar við á framsýningina, ið ung frá Tórshavnar Listaskúla hava framleitt, sigur Jóhannes Eli Iversen at enda.

Framsýningin verður fyri almenninginum leygardagin og sunnudagin frá klokkan 14 og fram til klokkan 19 í Eysturskúlanum í Havn.



## FAKTA

Skrá:

Leygardagin 8 apríl:
- Kl. 14.00 Framsýningin letur upp
- Kl. 14.10 Barnakórið Dropar við Sigrið Sivertsen
- Kl. 15.00 GHM viðAndreu Hendriksdóttir
- Kl. 19.00 Framsýningin letur aftur

Sunnudagin 9 apríl:
- Kl. 15.00 Havnar Hornorkestur við Ova Olsen
- Kl. 16.00 Kórið Sólarmagn við Fróða Sandoy
- Kl. 17.00 Bendarspóni við Karl A. Klein
- Kl. 19.00. Framsýningin letur aftur

# Upptøkuroynd til foto-filmsverkætlan

Nú mánadagin verður høvi hjá gentum í aldursbólkinum 14-17 ár at fara til upptøkuroynd til eina foto-filmsverkætlan hjá Marionnu Mørkøre og svensku myndakvinnuni Mariu Arnell.

Marianna er upprunaliga útbúgvin innan Fashion Promotion í London, men hevur arbeitt nógv innan videofilmslist í Týsklandi, Kanada og Danmark – eitt nú í samstarvi við Rannvá Káradóttir og Andras Olsen. Maria Arnell er útbúgvin fotografur í London.

– Hóast stórur dentur verður lagdur á klæðini í hesi verkætlan, er hetta tó ikki ein vanlig mótaseria. Talan er um eina svarthvíta myndarøð, har dentur verður lagdur á at skapa eina grafiska surrealistiska kenslu. Hetta verður gjørt við eitt nú einføldum, statiskum rørslum. Sum eina roynd at arbeiða við gomlum filmsformatum verður eisini tikið upp við Super8 filmsmyndatóli, siga tær báðar.

Upptøkuroyndin verður hildin í fimleikarhøllini í Sankta Frans Skúla, mánadagin klokkan 14 og fram til klokkan 17. Genturnar skulu møta uttan make-up. Nærri fæst at vita hjá Marionnu Mørkøre á tlf. 508246.

**- horsdal**